# Pensjónistar ov dýrir fyri landskassan

Fyri at minka hallið á fíggjarlógin, ætlar samgongan nú at taka 12 milliónir frá teimum, sum fáa fólkapensjón, avlamispensjón, fyritíðarpensjón, barnapengar ella aðrar almannaveitingar.

Sum støðan hevur verið, eru allar almannaveitingar automatiskt hækkaðar 4% um árið við tí fyri eyga at byrgja upp fyri príshækkingum, so at livistøðið ikki skuldi lækkað av tí, at prísirnir á mati, olju og øðrum, fóru upp.

Men fyri stuttum lækkaði samgongan hesa hækkingina niður í 3%. Og næsta ár er ætlanin, at hækkingin skal fella heilt burtur.

Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum, er nú í ferð við at snikka eitt lógaruppskot til, har endamálið er at taka hesa prístals-hækkingina burtur í 1011.

Rósa Samuelsen sigur, at hetta fer at spara landskassanum fyri eina útreiðslu upp á 12 milliónir í 2011, sum sostatt verða tiknar frá øllum teimum, sum fáa pensjónir av ymsum slagi.

Men í játanarkarminum, sum varð samtyktur í Løgtinginum í vár, ger samgongan eisini greitt, at automatiska hækkingin upp á 3% skal eisini setast úr gildi í 2012 og tað fer so at spara landskassanum eina útreiðslu upp á 12 milliónir afturat.

Men her kann verða lagt afturat, at í lógini, sum automatiska hækkingin verður avtikin eftir, er ongin tíðaravmarking.

Hinvegin sigur Fróði Jacobsen, stjórnarsamskipari í almannamálaráðnum, at politiski viljin er, at her er talan um eina fyribils loysn.

Samgongan sigur í endamálið er, at útreiðslurnar til almennar lønir, skulu ikki hækka í 2011 og í 2012.

Tað merkir at enda samráðingarnar millum fígjarmálaráðið og fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum við lønarhækkingum, skulu tilsvarandi sparingar finnast á fíggjarlógini.

Men av tí, at útreiðslurnar til lønir ikki skulu hækka, heldur samgongan eisini, at tað rættasta er, at almannaveitingarnar heldur ikki skulu hækka í 1012 og 2011

Men lagt verður afturat, at enda samráðingarnar kortini við, at lønirnar hækka, skal málið um at strika hækkingarnar í almannaveitingunum, eisini takast upp til nýggja viðgerð.

Tað er eisini ætlanin, at lestrarstuðulin skal frystast fastur í 2011 og 2012 og tað sparir landinum 4,5 milliónir krónur tilsamans hesi bæði árini.

## » Almennar lønir skulu ikki hækka og tí eiga pensjónir heldur ikki at hækka

# Tak frá okkum

**SKERDIR PENSJÓNISTAR Tað er spell at samgongan aftur tekur frá teimum, sum hava minst frammanundan. Teir kundu heldur tikið eitt sindur meiri frá okkum øðrum, sigur landsformaðurin hjá pensjónistunum**

Áki Bertholdsen

– Hetta er spell!

Sigvald Kristiansen, formaður í Landsfelag pensjónistanna, harmast um, at samgongan enn einaferð hevur gjørt av at skerja livikorini hjá pensjónistunum fyri at fáa hallið á fíggjarlógini at minka.

Hann sigur, at enn hevur felagið ikki fingið uppskotið um at strika javningina av pensjónum fyri næsta ár, til hoyringar.

Hinvegin ásannar hann, at vit eru mitt í sparitíðir og undir hesum umstøðum slepst ikki undan, at pensjónistar eisini koma at merkja til sparingar.

– Men tað skal ikki raka teir, sum frammanundan eru ringast fyri, sigur Sigvald Kristiansen.

Í hesum sambandi sipar hann til teir pensjónistar, ið bara hava fólkapensjón og Samhaldafasta, sum formliga eitur AMEG, at liva av.

– Tað eru tveir triðingar av pensjónistunum, ið onga aðra inntøku hava enn fólkapensjón og AMEG at liva av. Og tað sigur seg sjálvt, at verður automatiska árliga hækkingin upp á 3%, sum skal byrgja upp fyri príshækkingum, eisini strikað, fer tað at merkjast væl hjá øllum hesum pensjónistunum.

– Tað merkir, at fólkapensjónin fer at standa í stað, hóast prísirnir í samfelagnum uttan fara at hækka.

– Sostatt fer hetta at føra við sær, at keypiorkan og harvið livistøðið, hjá pensjónistunum, fer at lækka enn meiri.

### Breiðir herðar

Ístaðin fyri at raka tey, sum bara hava vanliga fólkapensjón og AMEG at liva av, skjýtur formaðurin í Landsfelag Pensjónistanna upp, at politikararnir friða teir pensjónistar, ið bara hava fólkapensjón og AMEG, og ikki taka meiri frá teimum.

Skal nakað partú takast frá pensjónistum, eigur tað at verða tikið frá teimum, sum hava aðra inntøku afturat pensjónini og AMEG.

– Í slíkum førum eiga vit, sum hava góða pensjón afturat vanligu fólkapensjónini, at tola, at betala tann partin eisini, so at teir pensjónistar, sum eru ringast fyri, fáa frið, sigur Sigvald Kristiansen.

Annars hevur Almannaráðið boðað frá, at uppskotið er sent avvarðandi pørtum til hoyringar.

Tá ið vit tosaðu við Sigvald Kristiansen, hevði ikki sæð lógaruppskotið, men hann væntar at Landsfelag Pensjónistanna er ein avvarðandi partur.

– Tá ið vit fáa uppskotið fara vit at viðgera tað og at siga okkara meining, sigur hann

*aki@sosialurin.fo*




*Sigvald Kristiansen, formaður í landsfelagnum hjá pensjónstunum, heldur, at pensjónistar, sum bara hava fólkapensjón og AMEG at liva av, eiga at fáa frið, so kunnu pensjónistar, sum hava aðra inntøku afturat, heldur betala meir*

# So nógv missa pensjónistarnir

Her er ein uppgerð yvir, hvussu hart tey nýggjastu tiltøkini hjá samgonguni raka pensjónistarnar. Tað sæst, at næsta árini missur ein stakur pensjónistur 1.356 krónur og í 2102 missur hann 2.752 krónur.

Sostatt ger broytingin, sum samgongan nú ætlar at seta í verk, at í 2012 verður ein stakur pensjónistur 4.108 krónur fátækari enn hann er í dag.

Ein giftur pensjónistur missur tilsamans 2.999 krónur hesi bæði næstu árini.

Tað er Landsfelag Pensjónistanna, sum hevur sett roknistykkið upp.

## STØK

**Missur av pensjónsviðbótini: 37.884 kr. x 3 % = 1.136 kr.**
**Missur serligari viðbót/oljuviðbót: 7.344 kr. x 3 % = 220 kr.**
**Sostatt er skerjingin í 2011: 1.136 kr. + 220 kr. = 1.356 kr.**
**Skerjing í 2012: 1.356 kr. + 1.170 kr. + 226 kr. = 2.752 kr.**

## GIFT

**Missur av pensjónsviðbótini: 29.328 kr. x 3% = 880 kr..**
**Missur av serligari viðbót/oljuviðbót: 3.672 x 3% = 110 kr.**
**Skerjing í 2011: 880 kr. + 110 kr. = 990 kr**
**Skerjing í 2012: 990 kr.+ 906 kr. + 113 kr. = 2.009 kr.**